SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Eg haldi, at vit eiga at fyrireika okkum til, at USA verður noytt til at tingast við sínar fíggindar*

*David Petraeus, generalur*

# USA vil hava altjóða kreppufund

**Amerikanski fíggjarmálaráðharrin, Henry Paulson, hevur biðið um fund við hini londini í G20-bólkinum um fíggjarkreppuna**



*Henry Paulson, fíggjarmálaráðharri, avmyndaður saman við George W. Bush, forseta*
*Mynd: AP*

Amerikanski fíggjarmálaráðharrin, Henry Paulson, hevur biðið um eykafund í tí sokallaða G20-bólkinum, sum umfatar øll tey størstu ídnaðarlondini í heiminum. Fundarevnið verður kreppan á altjóða fíggjarmarknaðinum, og tí eru tað fíggjarmyndugleikiarnir og tjóðbankaleiðslurnar í teimum einstøku londunum, sum hava fingið fundarboð.

Henry Paulson segði á tíðindafundi í nátt, at eftir hansara tykki er tað neyðugt við samskipaðum tiltøkum fyri at tryggja altjóða fíggjarmarknaðin. Hann legði dent á, at tað er neyðugt at fara varisliga fram, so eingin kemur at gera øðrum ónáðir.

- Myndugleikar í fleiri londum hava og fara at taka stig til at verja síni fíggjarkervi, at tryggja peningin hjá borgarunum, men tað er eisini neyðugt at útvega gjaldføri, segði amerikanski fíggjarmálaráðharrin.

Hann segði, at hann fer bat tosa við brasilsku stjórnina, sum í løtuni hevur formansskapin í G20-bólkinum.

## Ríkið yvirtikið Kaupthing

**Íslendska fíggjareftirlitið hevur yvirtikið landsins størsta banka, Kaupthing**

Fíggjareftirlitið skrivar á síni heimasíðu, at avgerðin at yvirtaka landsins størsta banka er eitt neyðugt stig fyri at røkka málinum hjá stjórnini og Altinginum um at fáa bankaraksturin í eina trygga legu og at tryggja innlánini.

Samstundis hevur fíggjareftirlitið veitt trygd fyri, at øll innlán í Kaupthing eru tryggjað.

Kaupthing hevur verið sera virkin uttan fyri Ísland, eitt nú í Føroyum og Danmark. Í Danmark eigur bankin millum annað FIH Erhvervsbank, sum er ein av teimum størstu bankunum í Danmark.

Kaupthing er tann triði bankin, sum tað almenna hevur yvirtikið. Hinir báðir eru Landsbankinn og Glitnir.

# Amerikanarar eiga at tingast við fíggindan

**David Petraeus, generalur, sum um stutta tíð fær ábyrgdina av teimum amerikonsku hermonnunum í Afghanistan, heldur, at USA eigur at fyrireika seg til at tingast við sínar fíggindar**

- Í hesum tíðum royni eg at vanda mær um orðini, men mín hugsan er, at vit verða noydd at tingast við fíggindan, sigur David Petraeus við amerikanskar fjølmiðlar. Hann leggur dent á, at orð hansara hava einki við amerikanska forsetavalstríðið at gera.

Í hálvtannað á hevur David Petraeus verið ovasti fyri teimum amerikonsku hermonnunum í Irak, men herfyri fekk hann starv í amerikonsku herleiðsluni og skal millum annað hava ovastu ábyrgdina av teimum amerikonsku hermonnunum í Afghanistan.

- Vit mugu vita, hvønn vit tosa við, og samrøðurnar skulu hava eitt greitt endamál, sigur generalurin, sum fær æruna av, at tað er vorðið rættiliga friðarligt í Irak tað seinasta árið. Seinni í hesum mánaðinum tekur hann við starvinum í amerikonsku herleiðsluni.



*David Petraeus, generalur*
*Mynd: Polfoto*

## STUTT SAGT

### Spania stovnar neyðgrunn

Í Suðurevropa eru fleiri av bankunum komnir í somu trupulleikar sum bankar norðari í Evropa og hinumegin Atlantshavið. Spanski forsætisráðharrin, Jose Luis Zapatero, kunngjørdi í gjár, at stjórnin hevði samtykt at stovna ein neyðgrunn við 30 milliardum evrum til at styrkja landsins fíggjarkervið.

Zapatero boðaði samstundis frá, at ríkiskassin tryggjar øllum innlán í bankunum upp til 100.000 evrur, og tað er tvær ferðir meiri enn tað mestamarkið, sum fíggjarmálaráðharrarnir í ES-londunum samdust um fyri nøkrum døgum síðani.

Í Italia boðaði Silvio Berlusconi, forsætisráðharri, frá í gjár, at hann hevði boðað stjórnini á kreppufund at umrøða støðuna hjá tí fíggjarliga kervinum, tí fleiri av landsins bankum líða undir remingunum kring heimin.



*José Luis Zapatero er spanskur forsætisráðharri*
*Mynd: Polfoto*

### Kvinna stakk sambúgvan

Eitt kjak millum tvey sambúgvandi fólk í Esbjerg fyrradagin endaði við, at kvinnan tók ein knív og stakk mannin.

Løgreglan í Esbjerg sigur við blaðið JydskeVestkysten, at maðurin bleiv stungin íbringuna. Hann bleiv alt fyri eitt fluttur á sjúkrahús og lagdur undir skurð, sum sambært blaðnum eydnaðist væl.

Løgreglan sigur, at maðurin var farin um tey seksti, meðan kvinnan er væl yngri.